# Bárður í heims fl

**Føroyski myndamaðurin Bárður Eklund er júst innlimaður í Nordic Photo Masters, ið gevur nøkrum fáum útvaldum møguleikan at gerast partur av altjóða elituni innan myndatøku**



*Bárður Eklund, myndamaður, setur nú beina kós móti altjóða elituni innan myndatøku*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

ÚRTØKA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið fekk føroyski myndamaðurin Bárður Eklund boð um, at hann er ein av teimum 16 myndafólkunum, sum júst eru vald út til tann sonevnda Nordic Photo Master Class.

Endamálið við Nordic Photo Master Class er at savna bestu myndafólkini í Norðurlondum og menna tey víðari til at gerast partur av heimselituni innan myndatøku.

- Hetta er sjálvandi ein sera stórur heiður og eitt fjálgandi herðaklapp. Eisini gleði eg meg ótrúliga nógv til at fáa serundirvísing frá nøkrum av heimsins bestu myndafólkum, ið er nakað av tí, ið eisini fylgir við, tá tú verður innlimaður í Nordic Photo Master Class, sigur Bárður Eklund.

## Vakt ans

Myndafólk kunnu ikki sjálvi søkja um upptøku í Nordic Photo Master Class, men verða vald út, tí tey hava víst heilt serlig evni innan myndatøku.

Seinnu árini hevur Bárður Eklund fleiri ferðir gjørt vart við seg – kanska serliga innan portrettmyndatøku, ið eisini gav honum heiðurin sum Ársins Portrettfotografur í Danmark í 2004.

Portrettmyndirnar hjá Bárði Eklund vekja framvegis stóran ans, uttan iva tí tær ofta eru óvanliga naknar og erligar.

- Tað er serliga ein avbjóðing at taka portrettmyndir av kendum fólkum, tí bæði tey sjálvi og onnur longu hava eina rímiliga fastlæsta mynd av, hvussu hesi kendu andlitini helst skulu taka seg út. Uppgávan hjá mær er so, at royna at rista hesa myndina av mær, fara afturum hana og vísa eina aðra síðu av kenda andlitinum, sigur Bárður Eklund.

## Gleðir seg til frálæru

Hóast portrettmyndir eru vorðnar eitt av serøkjunum hjá Bárði Eklund, hevur hann altíð ynskt at sleppa at arbeiða meir við eitt nú dokumentarfoto. Sum útbúgvin fotojournalistur, heldur hann altíð eitt vakið eyga við, hvussu ein mynd best kann illustrera eina grein. Hinvegin er hetta eitt øki, har tað kann verða trupult at menna seg og fáa tað at mala runt fíggjarliga samstundis.

- Sum limur í Nordic Photo Master Class fært tú millum annað frálæru í



*Eyðun Nolsøe*

*Mynd: Bárður Eklund*